Álit

í

løgtingsmáli nr. 90/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Leingjan av gildistíð til 1. februar 2022)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 23. februar 2021, og eftir 1. viðgerð 25. februar 2021 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 25. februar 2021.

Nevndin heldur, at tað hevði verið betri, um hetta uppskotið varð framlagt í Løgtinginum fyri tíð síðan, soleiðis at tað ikki var neyðugt at skunda málið ígjøgnum. Eisini metir nevndin, at tað hevði verið skilagott at eftirhugt allar hjálparpakkarnar fyri at eftirmett, um freistir og annað skulu broytast.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 25. februar 2021

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Eyðgunn Samuelsen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Annika Olsen

Erhard Joensen